Ár 2005, hin 25. januar

Ár 2005, hin 25. januar kl. 18.00 hevði Klaksvíkar Býráð býráðsfund við niðanfyri standandi fundarskrá.

Allir limir á fundi.

1.
2005-19-006 Góðkenning av broyting av viðtøkunum fyri sjálvsognarstovnin "Undir Kráarbrekku".

Hjáløgd er fundarfrásøgn hjá nevndini fyri sjálvsognarstovnin, sum hevur samtykt at broyta viðtøkurnar fyri stovnin. Hetta verður gjørt í sambandi við, at Vistarheimsnevndin fær aftur sítt innskot í Kráarbrekkuætlanina, sum ístaðin verður sett í eina verkætlan í kjallarahæddini undir Sambýlinum á Heygnum, sum kommunan hevur ognað sær. Í hesum sambandi er avtalað, at Klaksvíkar Býráð skal hava 3 limir (hevur havt 1 til nú), samstundis sum Vistarheimsnevndin missir báðar sínar limir. Annars óbroytt samanseting. Sí skriv frá umsitingini, dagf. 20.01.05.

Býráðsins samtykt:
Broytingin góðkend.
Samtykt.

2.
2005-19-005 Val av nevndum.

[[Eingin broyting viðvíkjandi valbólkunum, sum sotatt eru teir somu sum á 1. býráðsfundi (sí býráðsfundin tann 20. desember 2004), har Javnaðarflokkurin (Eyðgunn Samuelsen og Torleif Sigurðsson), Sjálvstýrisflokkurin (Kristian Eli Zachariasen) og Sambandsflokkurin (Hans Arne Bertholdsen) boðaðu frá valbólki (minnilutin), og Fólkaflokkurin (Jákup Mikkelsen, Kristian Fríðrik Olsen, Gunvá við Keldu og Atli S. Justinussen) og Tjóðveldisflokkurin (Steinbjørn O. Jacobsen, Jórun Høgnesen og Rani Nolsøe) boðaðu somuleiðis frá valbólki (meirilutin).]]

Val av limum í valnevnd til býráðsval í Klaksvíkar Kommunu 2005-2008
Sambært §3 í kommunuvallógini verða kommunustýrisval "fyrireikað og fyriskipað undir leiðslu av eini valnevnd, sum sett er av bygdaráðnum/býráðnum. Nevndin hevur í minsta lagi 3 limir og skipar seg sjálv. Nevndin situr sama tíðarskeið sum bygdaráðið/býráðið".

Valnevndin hevur frammanundan hesa manning: Finn Kjølbro, Tróndur Fuglø og Svanhild Isaksen.
Sostatt skulu veljast 3 limir:

Býráðsins samtykt:

1) Finn Kjølbro

2) Svanhild Isaksen

3) Tróndur Fuglø

Val av limum í valstýrið fyri atkvøðuøkið Mikladalur og Trøllanes 2005-2008
Sambært §8, stk. 3, í kommunuvallógini "verður í kommunum við fleiri atkvøðuøkjum sett serligt stýri við valstýrarum fyri hvørt økið at stíla fyri valinum har. Hesi valstýri verða sett av bygdaráðnum/býráðnum eftir vanligum reglum fyri val av nevndum (lutfalsvalháttur). Valstýrið, sum skal hava í minsta lagi 3, í mesta lagi 9 limir, skipar seg sjálvt. Eingin veljari kann bera seg undan vali til valstýrara, uttan so at hann hevur lógligt forfall".

Frammanundan hevur sitið ein valnevnd við trimum limum.

Mælt verður til at velja 3 limir:

Býráðsins samtykt:

1) Jógvan Joensen (á Nesi)

2) Joen Hendrik Henriksen

3) Heini Glerfoss

Val av limum í valstýrið fyri atkvøðuøkið Árnafjørður 2005-2008
Sambært §8, stk. 3, í kommunuvallógini "verður í kommunum við fleiri atkvøðuøkjum sett serligt stýri við valstýrarum fyri hvørt økið at stíla fyri valinum har. Hesi valstýri verða sett av bygdaráðnum/býráðnum eftir vanligum reglum fyri val av nevndum (lutfalsvalháttur). Valstýrið, sum skal hava í minsta lagi 3, í mesta lagi 9 limir, skipar seg sjálvt. Eingin veljari kann bera seg undan vali til valstýrara, uttan so at hann hevur lógligt forfall. Bygdaráðslimur/býráðslimur ella persónur, sum er uppskotin sum valevni, kann ikki vera limur í valstýrinum".

Valstýrið hevur frammanundan hesa manning: Guttorm F. Olsen, Charlotta Thorsteinsson, Theodor Askham Olsen og Atli S. Justinussen, sum nú er býráðslimur og tí ikki kann halda fram í valstýrinum..

Mælt verður til at velja 3 ella 4 limir:

Býráðsins samtykt:

1) Guttorm F. Olsen

2) Charlotta Thorsteinsson

3) Theodor Askham Olsen

4) Regin Hansen

Val av limum í valstýrið fyri býráðs-, løgtings- og fólkatingsval 2005-2008
Sambært §8, stk. 3, í kommunuvallógini "verður í kommunum við fleiri atkvøðuøkjum sett serligt stýri við valstýrarum fyri hvørt økið at stíla fyri valinum har. Hesi valstýri verða sett av bygdaráðnum/býráðnum eftir vanligum reglum fyri val av nevndum (lutfalsvalháttur). Valstýrið, sum skal hava í minsta lagi 3, í mesta lagi 9 limir, skipar seg sjálvt. Eingin veljari kann bera seg undan vali til valstýrara, uttan so at hann hevur lógligt forfall".

Løgingsvallógin ásetur í §20, at "atkvøðugreiðslan á hvørjum valstaði verður fyriskipað undir leiðslu av einum valstýri, sum sett er av bygdaráðnum/býráðnum. … Stýrið hevur í minsta lagi 3 og hægst 5 limir og skipar seg sjálvt".

Fólkatingsvallógin ásetur í §19, at "senest når valg er udskrevet, vælger kommunalbestyrelsen for hvert valgdistrikt mindst 3 og højst 5 valgstyrere til at forestå afstemningen og stemmeoptællingen på valg-stedet".

Seinnu tíðina hevur býráðið valt sama valstýri fyri býráðs-, løgtings- og fólkatingsval, og valstýrið hevur frammanundan hesa manning: Karl Johansen formaður, Poulina Andreasen, Pól Mikkelsen, Jabjørt Thomsen og Eydna Thomsen.

Mælt verður til at velja 5 limir:

Býráðsins samtykt:

1) Karl Johansen

2) Poulina Andreasen

3) Pól Mikkelsen

4) Jabjørt Thomsen

5) Eydna Thomsen

Val av limum og tiltakslimum í barnaverndarnevndina 2005-2008
Galdandi barnaverndarlóg sigur §1, stk. 2, at "børneværnsudvalget skal efter kommunalbestyrelsens bestemmelser bestå af mindst 5 medlemmer og højst 7 medlemmer. Medlemmerne, og om muligt suppleanter for disse, vælges af kommunalbestyrelsen blnadt kommunens beboere for den kommunale valgperiode blandt personer, der opfylder betingelserne for valg til kommunal bestyrelsen. Udvalget vælger selv sin formand og næstformand".

Í drúgva tíð hevur landsstýrið arbeitt ítøkiliga við nýggjari lóggávu fyri barnaforsorgarøkið, sum tó ikki enn er samtykt. Ætlanir landsstýrisins eru tó somikið ítøkiligar, at kommunurnar eru bidnar um bert fyribils at velja limir og varalimir sambært galdandi lóggávu, hetta til ætlaða nýggja barnaforsorgarlógin kemur í gildi, ætlandi um eitt ár ella so.

Í samsvari við lóggávuna hevur barnaverndarnevndin higartil verið mannað av 5 limum og 5 tiltakslimum.

Mælt verður til, eins og frammanundan at velja 5 limir og 5 tiltakslimir í barnaverndarnevndina fyri árini 2005-2008, ella til ætlaða nýggja barnaforsorgarlógin er komin í gildi.

Býráðsins samtykt:

Limir:

1) Kristin Ryan

2) Vónbjørt Gudjónsson

3) Jóngerð Biskopstø

4) Dánjal Ennistíg

5) Karl Gudmund Henriksen

Varalimir:

1) Hanna Thøgersen

2) [navnið kemur seinni]

3) Sólfríð Jacobsen

4) Elsba Lützen

5) Finnur Sigurðsson

Val av limum í ferðslunevnd býráðsins 2005-2008
Sambært býráðssamtykt í máli nr. 12 tann 22. januar 1991, skal politistøðin velja ein lim, Tekniska Deild kommununnar velja ein lim og býráðið ein lim.

Vanliga er tað býráðið, sum staðfestir nøvnini á teimum, ið skulu manna nevndina í komandi valskeiði.

Sostatt skulu veljast 3 limir:

Býráðsins samtykt:

1) Hans Arne Bertholdsen (umboð fyri býráðið)

2) Hans L. Djurhuus (umboð fyri løgregluna)

3) Gunnleyg K. Dánjalsson (umboð fyri teknisku umsiting)

Val av limum í brunanevnd býráðsins 2005-2008
Kommunustýrisskipan býráðsins, §33, 1. petti, ásetur, at "Brunanevndin hevur 5 limir. Í brunanevndini sita borgarstjórin, leiðarin fyri sløkkiliðnum, sýslumaðurin og 2 limir, tilnevndir av býráðnum".

Sostatt skulu hesir limir veljast:

1) Steinbjørn O. Jacobsen borgarstjóri

2) Kári Kjelnæs sløkkiliðsleiðari

3) Hans L. Djurhuus sýslumaður

Býráðsins samtykt:

4) Ólavur Ó. Poulsen (umboð fyri býráðið)

5) Hans J. á Kósini (umboð fyri býráðið)

Val av limum í gøtunavnanevnd býráðsins 2005-2008
Kommunustýrisskipan býráðsins, §34, 2. petti, ásetur, at "Gøtunavnanevndin hevur 3 fastar limir, ið verða valdir av býráðnum fyri eitt 4 ára skeið í senn aftan á hvørt býráðsval".

Nevndin hevur frammanundan hesa manning: Finn Kjølbro, Ove Frederiksen og Jógvan Ravnsfjall.

Sostatt skulu veljast 3 limir:

Býráðsins samtykt:

1) Finn Kjølbro

2) Ove Frederiksen

3) Jógvan Ravnsfjall

Val av limum í skattakærunevndina fyri Norðoya øki 2005-2008
Kommunustýrisskipan býráðsins, §31, 1. petti, ásetur, at "Skattakærunevndin hevur 4 limir og 4 tiltaks-limir úr Klaksvíkar kommunu, sbrt. kunngerð nr. 8 frá 5. februar 2001 um val av limum í kommunalu skattakærunevndirnar".

Sostatt skulu veljast:

Býráðsins samtykt:

Limir:

1) Odd Færø

2) Leivur Vitalis

3) Erling Petersen

4) Markus Tummas Jacobsen

Varalimir:

1) Per Andrew Olsen

2) Jógvan Vágsheyg

3) Símun á Høvdanum

4) Knút Olsen

Val av umboðum býráðsins í nevndina fyri Klaksvíksgrunnin 2005-2008.
Sambært viðtøkunum fyri Klaksvíksgrunnin, § 4-5, er nevndin fyri grunnin, sum skipar seg sjálv, mannað við einum umboði fyri landsstýrið (valt fyri 3 ár) og tveimum fyri Klaksvíkar Býráð (vald fyri 2 ár).

Nevndin hevur frammanundan hesa manning:

Jórun Høgnesen og Jørgen Ellingsgaard vegna býráðið og Jan A. Joensen vegna landsstýrið.

Sostatt skal býráðið velja 2 limir, og hóast viðtøkur Klaksvíksgrunsins siga, at býráðsumboðini verða vald fyri tvey ár, verður av praktiskum orsøkum mælt til, at býráðið velur hesi bæði umboðini fyri alt valskeiðið.

Býráðsins samtykt:

1) Jórun Høgnesen

2) Christian Olsen

Val av limum og varalimum í nevndina fyri sjálvsognarstovnin Mylnuhúsið, 2005-2008
Í reglugerðini fyri sjálvsognarstovnin Mylnuhúsið er ásett í §3, at "Stovnurin verður stjórnaður av eini fimm-mannanevnd. Klaksvíkar Býráð velur 3 limir og 3 varalimir fyri hesar. Hinir báðir limirnir og varalimir teirra verða valdir av og millum foreldrini, sum hava børn á stovninum. Valini eru fyri valskeið býráðsins. Um eitt av foreldraumboðunum ikki longur hevur barn sítt á stovninum, verður annað umboð at velja innan 14 dagar frá tí, at barnið fór av stovninum.

2. stk. Nevndin skipar seg sjálv við formanni, næstformanni og møguligum kassameistara.

3. stk. Klaksvíkar Býráð og foreldrini skulu hava valt síni umboð í nevndina í seinasta lagi 2 mánaðar eftir at býráðsval hevur verið. Klaksvíkar Kommuna skal hava boð um beinanvegin, hvør er valdur í nevndina, og hvussu hon hevur skipað seg".

Sostatt skal býráðið velja 3 limir og 3 varalimir:

Býráðsins samtykt:
Limir:

1) Anna Løwe Jacobsen

2) Anna Maria Joensen

3) Jóna Olsen

Varalimir:

1) Sigrid Nysted

2) Jan Gardar

3) Karl Martin Samuelsen

Val av limi og varalimi í nevndina fyri Tekniska Skúlan í Klaksvík, 2005-2008
Í viðtøkum Tekniska Skúlans í Klaksvík, sum er ein sjálvsognarstovnur, er ásett í §2, at "við sjálvsognar-stovnin verður valt eitt stýri. Stýrið hevur 6 limir, sum verða valdir fyri 4 ár – valskeiðið gongur frá 1. apríl til og við 31. mars eftir kommunuval. Fyri hvønn stýrislim verður ein varalimur valdur.

Stk. 2. Limirnir verða valdir soleiðis: (a) Viðkomandi yrkisfeløg á arbeiðsmarknaðinum velja tilsamans 4 limir við javnstórari umboðan av arbeiðsevarum og løntakarum. Føroya Handverksmeistarafelag velur 2 limir og Føroya Handverkarafelag 2 limir. (b) Klaksvíkar Kommuna, har skúlin hoyrir heima, velur 1 lim. (c) Starvsfólkini á skúlanum velja 1 lim".

Sostatt skal býráðið velja 1 lim og 1 varalim:

Býráðsins samtykt:
Útsett.

Val av limum og varalimum í umboðsnevndina fyri interkommunala elfelagið SEV, 2005-2008
Í viðtøkunum fyri Elfelagið SEV er m.a. ásett í §3, at "Í umboðsnevndina velur hvør kommuna ein umboðsnevndar- lim fyri hvørt byrjað 1000 íbúgvaratal" og at "Umboðsnevndarlimirnir verða valdir av nýggjum eftir hvørt kommunuval og starvast inntil nýggj umboðsnevnd er vald". Somuleiðis er ásett, at "táið umboðsnevndarlimur verður valdur, skal eisini veljast varalimur, ið tekur við, tá umboðsnevndar-liminum berst frá".

Sostatt skulu veljast:

Býráðsins samtykt:
Limir:

1) Sigurð Syderbø

2) Kristian Fríðrik Olsen

3) Klæmint Hansen

4) Torleif Sigurðsson

5) Julius Poulsen

Varalimir:

1) Hans Chr. Isaksen

2) Heini á Marknagili

3) Ólavur Samsen

4) Hans Arne Bertholdsen

5) Páll Josephsen

Val av limum og varalimum í stýrið fyri Sambýlið á Heygnum, 2005-2008
Í reglugerðini fyri Sambýlið á Heygnum er m.a. ásett í §3, at "Heimið verður stjórnað av einum stýri við 3 limum, ið allir verða valdir av Klaksvíkar Býráð. Stýrislimirnir verða valdir fyri eitt 4 ára skeið aftan á hvørt býráðsval. Stýrið skipar seg sjálvt við formanni og næstformanni. Býráðið ger av, um stýrislimir fáa samsýning. Stk. 2. Fyri hvønn stýrislim verður valdur ein varalimur, ið tekur sæti í stýrinum, tá viðkomandi stýrislimi berst frá".

Sostatt skal býráðið velja 3 limir og 3 varalimir:

Býráðsins samtykt:
Limir:

1) Jórun Høgnesen

2) Nikolas Solmunde Olsen

3) Tummas Lervig

Varalimir:

1) Rani Nolsøe

2) Rutt Johannesen

3) Gvøðbjørg West

Val av limum og varalimum í stýrið fyri Sambýlið í Bøgøtu, 2005-2008
Í viðtøkunum fyri kommunala "Sambýlið í Bøgøtu" er m.a. ásett í §3, at "Heimið verður stjórnað av einum stýri við 3 limum, ið allir verða valdir av Klaksvíkar Býráð. Stýrislimirnir verða valdir fyri eitt 4 ára skeið. Stýrið skipar seg sjálvt við formanni og næstformanni. Býráðið avger, um stýrislimir fáa samsýning. Fyri hvønn stýrislim verður valdur ein varalimur, ið tekur sæti í stýrinum, tá viðkomandi stýrislimi berst frá".

Sostatt skal býráðið velja 3 limir og 3 varalimir:

Býráðsins samtykt:
Limir:

1) Rani Nolsøe

2) Erik Andreasen

3) Elisabeth (Betta) Joensen

Varalimir:

1) Jórun Høgnesen

2) Bjørg Sørensen

3) Maiken Skarðenni

Val av umboði í stýrisbólkin fyri serflutningsskipanina 2005-2008
Sambært reglugerð fyri Serflutningsskipan Landsins, §2, er ein stýrisbólkur "ábyrgd av at fylgja við serflutninginum og taka sær av málum viðv. flutningi fyri brekað í Føroyum. Í stýrisbólkinum sita: 1 umboð fyri Føroya Landsstýri, 1. umboð fyri Strandfaraskip Landsins, 1 umboð fyri MBF og umboð fyri tær kommunur, ið eru við í skipanini. Stýrisbólkurin verður valdur fyri 4 ár. Annaðhvørt ár standa 2 limir fyri vali og annaðhvørt ár stendur 1 limur fyri vali. Kommunurnar skipa sjálvar fyri vali av sínum umboði".

Sostatt skal býráðið sum kommuna, ið er við í skipanini, velja 1 umboð í stýrisbólkin. Hesin hevur higartil verið Jancy B. Klein sosialdeildarleiðari.

Býráðsins samtykt:

1) Jancy B. Klein

Val av limi og varalimi í nevndina fyri Ferðavinnuna í Norðoyggjum, 2005-2008
Tað stendur ikki í viðtøkunum fyri Ferðavinnuna í Norðoyggjum, at býráðið skal velja 1 lim í nevndina, men hetta er eitt krav frá Ferðaráð Føroya fyri at stuðla. Nevndin telur íalt 5 limir, og rætt er helst eisini at velja ein tiltakslim.

Býráðsins samtykt:
Limur:

1) Gunvá við Keldu

Tiltakslimur:

2) Jórun Høgnesen

Val av umboði og varaumboði í umboðsráðið fyri Norðoya Fornminnasavn, 2005-2008
Í viðtøkunum fyri Norðoya Fornminnasavn er m.a. ásett í §5, at "allar kommunur í Norðoyggjum eru umboðaðar í savninum gjøgnum eitt umboðsráð, sum yvirfyri stjórnini og savninum kunnu reisa síni áhugamál viðvíkjandi savnsvirkseminum. Hetta umboðsráð verður valt soleiðis: Hvør kommuna í Norðoyggjum velur eitt umboð við eykaumboð í ráðið. Umboðini verða vald beint eftir, at bygda- og býráðsval hava verið, og sita tey valskeiðið út".

Her er kanska vert at viðmerkja, at umboðanin hjá Mikladals Kommunu er fallin burtur, við tað at kommunan nú er løgd saman við Klaksvíkar Kommunu.

Sostatt skal býráðið velja eitt umboð og eitt varaumboð í umboðsráðið:

Býráðsins samtykt:
Umboð:

1) Heini Mohr

Varaumboð:

1) Anna Katrin Matras

Val av limum í nevndina fyri Klaksvíkar Tónlistaskúla, 2005-2008
Reglugerðin fyri Klaksvíkar Tónlistaskúla, §2, sigur m.a., at nevndin, sum stjórnar skúlanum, er soleiðis manna: "*eitt býráðsumboð, sum er formaður í nevndini, verður valt av býráðnum aftan á hvørt býráðsval, galdandi fyri valskeiðið, *eitt foreldraumboð verður valt av foreldrunum við byrjan av hvørjum skúlaári. Skúlin skipar fyri hesum vali. *Triðji limurin verður valdur av býráðnum eftir tilmæli frá leiðaranum av skúlanum".

Sostatt skal býráðið sjálvt velja eitt umboð, sum verður formaður í nevndini, og so eitt umboð fyri tónleika-lívið í býnum, eftir tilmæli frá leiðaranum fyri skúlan.

Býráðsins samtykt:

1) Rani Nolsøe (býráðsins umboð)

2) Bjarni Ziska Dahl (eftir tilmæli frá leiðaranum fyri skúlan)

Val av limum í kirkjugarðsnevndina 2005-2008
Reglugerðin fyri kirkjugarðarnar í Klaksvíkar Kommunu, §2, sigur m.a., at í kirkjugarðsnevndini sita 5 limir; kirkjuráðið í Klaksvík velur 2 limir, og býráðið velur 3 limir. Valskeiðið er 4 ár og fylgir býráðs-skeiðinum. Nevndin skipar seg sjálv.

Sostatt skal býráðið velja 3 limir:

Býráðsins samtykt:

1) Petur J. Jacobsen

2) Jákup Ziskason

3) Hans Hjalti Skaale

Val av limi og varalimi í stýrið fyri Umlættingarheimið Dáan, 2005-2008
Viðtøkurnar fyri Umlættingarheimið Dáan við Bøgøtu ásetur m.a. í §3, at "ovasta leiðsla fyri heimið er eitt trímannastýri, ið verður valt soleiðis: (a) Føroya Landsstýri velur ein lim, (b) "Javni – Landsfelagið evna-veikum at bata" velur ein lim, (c) Klaksvíkar Býráð velur ein lim. Stk. 2: Fyri hvønn stýrislim verður valdur ein varalimur…

Sostatt skal býráðið velja ein lim og ein varalim í stýrið:

Býráðsins samtykt:
Limur:

1) Óli Olsen [Heygavegur, Klaksvík]

Varalimur:

1) Jón Harald Poulsen

Val av limum og varalimum í stýrið fyri Sjálvsognarstovnin Norðoya Røktarheim, 2005-2008
Í reglugerðini fyri sjálvsognarstovnin Norðoya Røktarheim er m.a. ásett í §3, at "Leiðslan fyri stovnin er eitt stýri við 9 limum, har *Fugloyar- og Svínoyar kommunur í felag velja 1 lim, *Mikladals-, Húsar- og Kunoyar kommunur í felag velja 1 lim, *Viðareiðis kommuna velur 1 lim, *Hvannasunds kommuna velur 1 lim, og *Klaksvíkar Kommuna velur 5 limir.

Limirnir verða valdir beinanvegin aftan á hvørt kommunuval. Fyri hvønn lim verður valt persónligt varafólk.

Nú Mikladals og Klaksvíkar Kommunur eru lagdar saman, fellur umboðið hjá Mikladals Kommunu til samanløgdu kommununa. Í tí sambandi krevst eitt samskift at fara fram við hinar kommunurnar, og verður tað gjørt í næstum.

Sostatt skal Klaksvíkar Kommuna velja 5 limir og 5 varalimir:

Býráðsins samtykt:
Limir:

1) Gunvør Sigurðsson

2) Jan Gardar

3) Gvøðbjørg West

4) Karl Heri Joensen

5) Signhild V. Joensen

Varalimir:

1) Hans Sylvian Jacobsen

2) Herfrí Sørensen

3) Elsebeth G. Hansen

4) Jóannes Bólstein

5) Hákun Dam

Val av limum í nevndina fyri Dr. Margrethu Barnagarð, 2005-2008
Reglugerðin fyri Dr. Margrethu Barnagarð, §3, sigur, at

”Sjálvsognarstovnurin verður stjórnaður av eini seks-mannanevnd. Nevndarvalið fylgir valskeiðnum hjá bý- / bygdarráðnum.

Nevndin er samansett soleiðis:

*Bý- og bygdaráðið velur ein lim,

*2 limir vera valdir av og millum foreldrini, sum hava børn á stovninum. Foreldraumboðini kunnu bert vera í nevndini so leingi tey hava børn á stovninum og vera annað / onnur umboð at velja ístaðin so skjótt foreldraumboðini ikki longur hava børn á stovninum.

*Nevndin í KFUM&K, Klaksvík, velur tríggjar nevndarlimir”.

Sostatt skal býráðið velja eitt umboð í nevndina.

Býráðsins samtykt:

1) Jórun Høgnesen

Val av limum í nevndina fyri stovnin Norðoya Vistarheim, 2005-2008
Í reglugerðini fyri stovnin Norðoya Vistarheim er m.a. ásett í §3, at ”Nevndi fyri stovnin er ”Nevndin fyri Norðoya Ellis- og Vistarheim”, sum er vald soleiðis: *4 limir fyri Klaksvíkar Kommunu, *1 limur fyri Kunoyar, Mikladals- og Húsa kommunur, *1 limur fyri Viðareiðis og Hvannasunds kommunur og *1 limur fyri Fugloyar og Svínoyar kommunur. Nevndin verður vald 4. hvørt ár aftan á býráðsval”.

Nú Mikladals og Klaksvíkar Kommunur eru lagdar saman, fellur umboðið hjá Mikladals Kommunu til samanløgdu kommununa. Í tí sambandi krevst eitt samskift at fara fram við hinar kommunurnar, og verður tað gjørt í næstum.

Sostatt skal Klaksvíkar Kommuna velja 4 limir í nevndina:

Býráðsins samtykt:

1) Hergerð Joensen

2) Erik Andreasen

3) Elsebeth G. Hansen

4) Jóannes Jóhannessen

Val av limum í hegnsýnisnevnd/ir í kommununi.
Í sambandi við kommunusamanleggina við Mikladals Kommunu, sum hevur viðført at fleiri bygdir eru í kommununi, ynskir umsitingin at kanna málið eitt sindur nærri, hvussu hesin parturin verður skipaður á besta hátt. Málið um valið av hesum verður tí tikið uppaftur á einum av næstkomandi býráðsfundum.

Val av limum í nevndina fyri Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku, 2005-2008
Víst verður til býráðsmál nr. 1 í 2005 (j. nr. 2005-19-006) um góðkenning av broyting av viðtøkunum fyri sjálvsognarstovnin “Undir Kráarbrekku”, har nevndin hevur samtykt at broyta viðtøkurnar fyri stovnin.

Í hesum sambandi er avtalað, at Klaksvíkar Býráð skal hava 3 limir (hevur havt 1 til nú), samstundis sum Vistarheimsnevndin missir báðar sínar limir. Annars óbroytt samanseting.

Sostatt skal býráðið velja 3 umboð í nevndina.

Býráðsins samtykt:

1) Steinbjørn O. Jacobsen

2) Maiken Skarðenni

3) Erik Andreasen

Val av limum og tiltakslimum í nevndina fyri sjálvsognarstovnin Húsarhaldsskúla Føroya, 2005-08
Sambært reglugerð fyri Húsarhaldsskúla Føroya skal Klaksvíkar Býráð velja 2 limir og 2 tiltakslimir í nevndina fyri skúlan. Nevndin hevur íalt 5 limir. Húsmøðrafelagið velur 2 og Kvinnusamskipan Føroya velur 1 lim.

Sostatt skal býráðið velja 2 limir og 2 varalimir:

Býráðsins samtykt:

Limir:

1) Kristianna Ei. Høgnesen

2) Hanna Jacobsen

Varalimir:

1) Signy Hansen

2) Margee Dam

Val av býráðsumboði í staðbundnu nevndina fyri Árnafjørð, 2005-08
Sambært kommunustýrisskipan býráðsins, §30, verður vald ein nevnd við 5 limum at taka sær av áhuga-málum í Árnafirði. Tríggir av limunum verða valdir og millum borgararnar í Árnafirði eftir reglunum í kommunalu vallógini. Ein limur verður valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

Sostatt skal býráðið velja 1 lim aftur at borgarstjóranum, (sum við verandi valbólkum í býráðnum fellur til minnilutan, tí hóast borgarstjórin er føddur limur og formaður, skal hann sambært §28, stk. 3, í kommunu-stýrislógini teljast við upp í sessatalið, sum valbólkur hansara hevur rætt at ogna sær).

Sostatt skal veljast ein limur í nevndina umframt borgarstjóran:

Býráðsins samtykt:

1) Kristian Eli Zachariasen

Val av býráðsumboði í staðbundnu nevndina fyri Mikladal, 2005-08
Í samtykta sáttmálanum um samanlegging av Klaksvíkar og Mikladals kommunu, § 11, er ásett, at "Partarnir eru samdir um, í samband við samanleggingina, at seta tvær staðbundnar nevndir samsvarandi §37 í Kommunustýrislógini, at ráðgeva og ummæla í málum viðvíkjandi staðbundnum viðurskiftum.

Valdar verða nevndir, ein fyri Mikladal, nevnd Mikladalsnevndin, og ein fyri Trøllanes, nevnd Trøllanesnevndin, sum hvør hevur 5 limir. Bygdarfólkið velur 3 limir fyri 4 ár, tá kommunuval er; borgarstjórin er nevndarformaður, býráðið velur hin limin".

Talan er sostatt um somu skipan, sum er galdandi fyri bygdina Árnafjørð, og býráðið skal sostatt velja ein lim aftur at borgarstjóranum, (sum við verandi valbólkum í býráðnum fellur til minnilutan, tí hóast borgar-stjórin er føddur limur og formaður, skal hann sambært §28, stk. 3, í kommunustýrislógini teljast við upp í sessatalið, sum valbólkur hansara hevur rætt at ogna sær).

Sostatt skal veljast ein limur í nevndina umframt borgarstjóran:

Býráðsins samtykt:

1) Kristian Eli Zachariasen

Val av býráðsumboði í staðbundnu nevndina fyri Trøllanes, 2005-08
Í samtykta sáttmálanum um samanlegging av Klaksvíkar og Mikladals kommunu, § 11, er ásett, at "Partarnir eru samdir um, í samband við samanleggingina, at seta tvær staðbundnar nevndir samsvarandi §37 í Kommunustýrislógini, at ráðgeva og ummæla í málum viðvíkjandi staðbundnum viðurskiftum.

Valdar verða nevndir, ein fyri Mikladal, nevnd Mikladalsnevndin, og ein fyri Trøllanes, nevnd Trøllanesnevndin, sum hvør hevur 5 limir. Bygdarfólkið velur 3 limir fyri 4 ár, tá kommunuval er; borgarstjórin er nevndarformaður, býráðið velur hin limin".

Talan er um somu skipan sum fyri Árnafjørð, og býráðið skal sostatt velja ein lim aftur at borgarstjóranum, (sum við verandi valbólkum í býráðnum fellur til minnilutan, tí hóast borgar-stjórin er føddur limur og formaður, skal hann sambært §28, stk. 3, í kommunustýrislógini teljast við upp í sessatalið, sum valbólkur hansara hevur rætt at ogna sær).

Sostatt skal veljast ein limur í nevndina umframt borgarstjóran:

Býráðsins samtykt:

1) Kristian Eli Zachariasen

Val av umboði í Kommunusamskipan Føroya (KSF), 2005-08.
Í samtykta sáttmálanum um samanlegging av Klaksvíkar og Mikladals kommunu, § 7, er ásett, at "Partarnir eru samdir um, at sameinda kommunan verður limur í Kommunusamskipan Føroya (KSF)".

Í viðtøkunum hjá KSF, §4, stk. 2, er ásett: "Til at taka avgerð á aðalfundi velur hvørt kommunustýri eitt umboð. Aðrir kommunustýrislimir hava rætt at møta og taka orðið á aðalfundi".

Sostatt skal veljast eitt umboð fyri býráðið, og verður í hesum føri mælt til at velja borgarstjóran:

Býráðsins samtykt:

1) Steinbjørn O. Jacobsen

Val av umboði í Interkommunala Felagsskapin IRF.

Býráðsins samtykt:

Samtykt við atkvøðugreiðslu við seðlum at velja Rana Nolsøe (7 atkvøður) sum umboð kommununnar í IRF. Hitt uppskotið, Torleif Sigurðsson, fekk 4 atkvøður.

3.
2005-19-003 møg. Val av 2. varaborgarstjóra.
Hetta mál verður reist eftir áheitan frá minnilutanum í býráðnum, ið skjýtur upp ta broyting, at val av 2. varaborgar-stjóra eisini fer fram. Um hetta uppskot fær undirtøku verða fylgjandi broytingar í kommunustýrisskipan býráðsins at samtykkja tvær ferðir av býráðnum, áðrenn broytingin fær gildi.

Sí skriv frá umsitingini.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við uppskotnu broytingunum av kommunustýrisskipanini, samb. skriv frá umsitingini, dagf. 14.01.05.

Býráðsins samtykt:

Tilmælið samtykt.

4.
2005-12-001 Hjálp til Tsunami.
Víst verður til skriv frá minnilutanum í býráðnum, dagf. 05.01.05, har heitt varð á býráðið um at lata hjálp til tey, sum eru rakt av flóðalduni í Asiu. Umsitingin mælir Sosialu nevnd til at stuðla við kr. 15.000,- av kontu "Serlig tiltøk", sí skriv frá umsitingini.

Sosiala nevnd samtykti at játta kr. 15.000,- av kontu "Serlig tiltøk". Nevndin mælir til, at kommunan játtar tilsamans kr. 35.000,-.

Mentunarnevndin mælir til, at kr. 35.000,- verða játtaðar til tiltakið. Nevndin mælir til, at kr. 10.000,- verða játtaðar av kontu 450753, og heitir á Fíggjarnevndina um at útvega restina av upphæddini.

Fíggjarnevndin tekur undir við Mentunarnevndini 12.01.05 og Sosialu nevnd 12.01.05, og at kr. 5.000,- afturat verða játtaðar við flyting millum kontur frá kontu nr. 690200 "Ferðir og umboðan" til hesa neyðhjálpina.

Býráðsins samtykt:
Samtykt, vísandi til tilmælið frá Fíggjarnevndini, at stuðla við Kr 30.000,- harav Kr 20.000,- gjøgnum Reyða Kross og Kr 10.000,- til Stellu Zachariasen.

Fundurin lokin kl. 18:30.